# Javnaðarflokkurin á landsstevnu

**Um vikuskiftið fer Føroya Javnaðarflokkur at halda landsstevnu á Selatrað. Byrjað verður fríggjakvøldið, og leygarkvøldið verður endað við náttverða. Stevnan er summarslig, og verða tað tískil nógv ymisk tiltøk at fara til**

TÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*

Millum tey mongu tiltøkini, sum skulu húsast á Skótadeplinum á Selatrað, eru barnatiltøk og politisk orðaskifti. Tað er floksleiðslan í Javnarflokkinum, sum leggur út við einum fundi, og síðani verður lagt upp til kjak.

Javnaðarmenn eru væl fyrireikaðir til stevnuna, tí hetta summarið hava nakrir arbeiðsbólkir útarbeitt fýra politisk tilmæli, sum skulu stimbra kjak innanfyri flokkin. Hesir arbeiðsbólkar hava viðgjørt evni sum fiskivinnnupolitikk, almenna fyrisiting, sjálvstýrispolitikk, og fíggjarlógararbeiði.

Hans Pauli Strøm sigur við Sosialin, at Javnaðarflokkurin vil hava ein meira markantan og týðuligan boðskap fram. Hann leggur aftrat, at Javnaðarflokkurin eftirlýsir einum breiðari samstarvi í sambandi við fíggjarlógina. – Sum nú er, er tað alt ov lítið samarbeiðið um fíggjarlógina, sigur Hans Pauli.


Javnaðarflokkurin kemur saman



### Ikki bert politikkur

Men tað er ikki bert politikkur, ið er á skránni um vikuskiftið, tí børnini fáa eisini høvi at luttaka í ymsum barnatiltøkum. Tað verður t.d. skipað fyri gongutúrum, har fólk kunnu taka sær av løttum í vøkru náttúruni á Selatrað. Tað verður farið ein túr í viðalundina og kanska ein túr niðan við ánni, sum liggur uppi í dalinum omanfyri bygdina.

Tiltøk, ið bera dám av mentan verða eisini á Selatrað um vikuskiftið, har ritgerð um lossingarmenn verður løgd fram. Tað er Erland V. Joensen, sum hevur skrivað ritgerðina. Og leikbókurin Gríma fer at framføra á stevnuni, har tey fara at viðgera ymisk evni úr søgunum úr Krabbaurð.

Fyriskipararnir av javnaðarstevnuni leggja dent á, at tiltakið er fyri øll. Javnaðarstevnan byrjar fríggjadagin klokkan 20:00 við sangi og báli, og øll floksleiðslan verður til staðar.


## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá góða mamma, vermamma, omma,
langomma og olduromma okkara

**Rosa Winther**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkið á B8 á Landssjúkrahúsinum,
sum vóru so góð við hana. Eisini ein tøkk
til prest, sangarar, berarar og tykkum
sum stóðu fyri ervinum.

Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávur til
Hjartafelagið og tykkum øllum, sum fylgdu
henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**


# Amerikanski sendiharrin í Danmark kemur hendavegin

**Stuart Bernstein, amerikanski sendiharrin í Danmark, kemur til Føroyar í næstum**

TÍÐINDI
*Hans Kárason Mikkelsen*


*Stuart Bernstein, amerikanski sendiharrin í Danmark, stendur her til vinstru saman við prinsessu Benediktu*

Stuart Bernstein skal millum annað eta døgverða í Kirkjubø, tá hann kemur til Føroyar, og er hetta fyrsta vitjanin hjá amerikanska sendiharranum í Føroyum. Bernstein kemur til Føroyar týsdagin, og er tað ein vitjan, har hann verður vístur runt í Føroyum.

Bernstein er ein kendur maður í USA. Hann hevur altíð havt fótin innanfyri tað politiska lívið, men hann hevur ikki sjálvur verið politikari. Stuart Bernstein er nevniliga múgvandi handilsmaður, og hann seldi hús og ognir. Men nú er hann blivin sendiharri hjá USA, og varð tað George W. Bush, ið tilnevndi hann, stutt eftir at fyrrnevndi inntók forsetaembætið í 2001.

Bernstein hevur í longri tíð stuðlað Bush og Republikanarum, og er hann altíð við á gestalistanum hjá George W. Bush, tá forsetin bjóðar inn. Bernstein stuðlaði eisini eldra Bush peningaliga, tá hesin førdi valstríð til forseta.

USA hevur 107 sendistovur kring heimin, men onga í Føroyum.


## *Tøkk*

*Hjartaliga takki eg øllum tykkum, familju, ætt, vinum og kenningum, sum gleddu meg á 90 ára degnum tann 28. juli 2003 við gávum, blómum, fjarritum og heilsanum annars.*

***Torkil Strøm, Vágur***




# Útnorðurráðið umborð á AWI-Star


*Útnorðurráðið á bryggjuni í Saltangará*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*

**Runavík:** Hósdagin í síðstu viku helt Útnorðurráðið ársfund á Eiði. Formaður í ráðnum undan fundinum, var Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður. Á Eiði tók grønlendski landstingsformaðurin, Jonathan Motzfeldt við formansstarvinum.

Í Sosialinum herfyri varð nomið við tey mál, sum viðgjørd vórðu á ársfundinum, eitt nú um tættari samstarv millum heilsumyndugleikarnar í útnorði.

Temaið til komandi ársfund hjá ráðnum verður orka.

Á fundinum á Eiði legði Jonathan Motzfeldt fram eina virkisætlan fyri komandi ár. Ætlanin leggur serliga dent á viðurskiftini hjá londunum í útnorði við ES, eins og dentur verður lagdur á samstarv millum Útnorðurráðið og Arktisku Parlamentarisku Nevndina.

Í røðuni legði Jonathan eisini dent á týdningin av at gagnnýta livandi tilfeingið burðardygt, ikki minst felags fiskastovnarnar í Norðurhøvum.

Á ársfundinum luttók eisini norski stórtingsformaðurin, Jørgen Kosmo.

### Vitjaðu FJM og AWI

Útnorðurráðið gav sær eisini stundir at vitja í Runavíkar kommunu, meðan steðgað var í Føroyum.

Seinnapartin síðsta fríggjadag varð farið ein túr til Æðuvíkar, og haðani inn á gólvið á maskinverkstaðnum, FJM í Runavík.

Eftir vitjanina hjá FJM, fóru øll tey stívliga 20 umboðini ein túr við einum AWI-Star báti, sum bátavirkið, AWI í Runavík, hevur bygt.

Sosialurin var á bryggjuni við myndatólinum, tá ið loyst varð frá landi.

Millum gestirnar umborð var norski stórtingsformaðurin, Jørgen Kosmo og grønlendski landstingsformaðurin, Jonathan Motzfeldt.

Føroyingarnir við AWI-Star bátinum vóru eitt nú bátabyggjarin, Aðalstein Anthoniussen og Lassi Klein, sum starvast á skrivstovuni hjá AWI-Boats.

Millum føroysku politikararnir á ferðini, var eitt nú Kári P. Højgaard, Jógvan á Lakjuni og Heini O. Heinesen, løgtingsmenn.

Býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, var eisini við.

Seinni um kvøldið bjóðaði Runavíkar býráð gestunum til døgurða í Kappróðrarneystinum á Glyvrum.


*So er loyst, og bæði Jonathan Motzfeldt og Jørgen Kosmo sleppa at royna nýggja AWI-Star bátin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


